# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- At Kuba er komið upp í Rio-bólkin eigur at siga amerikanarum, at USA ræður ikki í Latínamerika longur*

*Hugo Chavéz*



*Ísraelsku myndugleikarnir sendu fólk hjá herinum á vanlukkustaðið*

*Mynd: Polfoto*

## Kappkoyring millum bussførarar elvdi til stóra vanlukku

**Kappkoyring millum tveir bussførarar elvdi í gjár til ta ringastu ferðsluvanlukkuna í Ísrael**

Tey 60 russisku ferðafólkini vóru júst komin úr Russlandi við flogfari og vóru á veg til tann kenda frítíðarbýin Eilat við Reyðahavið í einum bussi. Á vegnum steðgaði bussurin við eina eftirlitsstøð. Tað gjørdi ein annar ferðafólkabussur eisini. Teir báðir bussførararnir fóru at keglast, og tað endaði við, at teir fóru at koyra kapp, tá bussarnir fóru avstaðaftur.

- Eftir at bussarnir vóru farnir frá eftirlitsstøðini, royndu teir báðir bussførararnir fleiri ferðir at yvirhála hvør annan, segði ísraelski samferðslumálaráðharrin, Shaul Mofaz, í gjár.

Løtu seinni fór annar bussurin út av vegnum og rullaði einar 80 metrar oman ta brøttu brekkuna. Tá bjargingarliðini komu á staðið, høvdu 24 av teimum 60 ferðafólkunum latið lív. Ísraelski bussførarin slapp við lívinum.

Í einum samkenslufjarriti til russiska forsetan, Dmitrij Medvedev, skrivaði ísraelski forsetin, Shimon Prees, at vanlukkan stóðst av einum mistaki hjá einum einstøkum manni, sum tó er ein vanlukka fyri eina heila tjóð.

Bussførarin bleiv tikin beint eftir vanlukkuna. Hann skuldi til avhoyringar í dag, og sambært løgregluni verður hann skuldsettur fyri ikki færri enn 22 brot á ferðslulógina.

## Lagt hjálparætlan fyri Zimbabwe

Londini í syðra parti av Afrika hava lagt eina umfatandi ætlan um at hjálpa Zimbabwe

Leiðararnir í londunum siga, at endamálið við ætlanini er at útvega fólkinum mat og at fáa tamarhald á kolerasjúkuni, sum hevur kravt umleið 1.000 mannalív í Zimbabwe. Hjálparfelagsskapir siga, at tað er vónleyst at steðga sjúkuni, sum breiðir seg skjótt, tí vatnveitingin er í stak vánaligum standi.

Forsetin í Suðurafrika, Kgalema Motlanthe, segði í morgun, at londini í syðra parti av Afrika eru sinnað at veita ta hjálp, sum tey eru før fyri. Hann segði, at londini fara at taka stig til eitt stórt átak, sum við altjóða stuðuli skal útvega zimbabwiska fólkinum hjálp ímóti hungri og kolerasjúkuni.

Suðurafrika og eintøk onnur lond í syðra parti av Afrika hava fyrr kravt, at zimbabwiski leiðarin, Robert Mugabe, skal góðtaka eina politiska semju við andstøðuna, áðrenn landið kann fáa hjálp.

## Hann kann hava latið russum norsk hernaðarloyndarmál

**Fyrrverandi ovastin fyri tjóðskapartrygdini í Letlandi er skuldsettur fyri njósning til frama fyri Russland**



*Herman Simm er ákærdur fyri njósning*

*Mynd: VG*

Fyrrverandi letlendski trygdarovastin, Herman Simm, bleiv tikin í heyst, tí tað bleiv avdúkað, at hann hevði njósnast fyri Russland. Sum trygdarovasti var hann við í ýmsum samstarvi millum Letland og NATO og fleiri NATO-lond, og hann kann tí hava útvegað sær hernaðarlig loyndarmál og latið russum tey.

Norska blaðið Aftenposten skrivar, at Herman Simm hevði millum annað samband við norsku verjuleiðsluna og norsku trygdarleiðsluna, og stjórin í trygdartænastuni, Geir A. Samuelsen, váttar fyri blaðnum, at málið viðvíkjandi Herman Simm kann vera sera álvarsamt. Fyrrverandi letlendski trygdarovastin var fleiri ferðir í Noregi. Seinast var í 2004.

Herman Simm bleiv tikin í Tallinn í heyst, og ætlandi kemur rættarmálið fyri rættin beint eftir nýggjár. Verður hann dømdur sekur, kann hann fáa upp í 15 ára fongsul.

**STUTT SAGT**

### McCain lovar ikki Palin stuðul

John McCain, sum var forsetavalevni hjá republikanarunum í USA í heyst, vil ikki binda seg til at styðja sítt egna varaforsetavalevni, Sarah Palin, um hon ætlar sær at stilla upp sum forsetavalevni um fýra ár, soleiðis sum røddir hava verið frammi um.

McCain segði í samrøðuni við sjónvarpið ABC fyrradagin, at hann kann ikki lova, at hann fer at styðja Sarah Palin. Hann legði afturat, at republikanski flokkurin eigur meiri enn ein dugnaligan guvernør og nevndi í hesum viðfangi Tim Pawlenty, sum er guvernørur til statinum Minnesota, og guvernørin í Utah, Jon Huntsman.

Fyrrverandi forsetavalevnið segði kortini, at hann hevur stóra virðing fyri Sarah Palin, sum er guvernørur í Alaska, og hann segði seg hava havt stóra gleði av at vera komin í samband við familju hennara.



*John McCain gongur sum vant egnar leiðir*

*Mynd: AP*

### Cameron hartar ætlan hjá stjórnini

Formaðurin í konservativa flokkinum í Bretlandi, David Cameron, heldur lítið um eina ætlan hjá stjórnini, sum hevur til endamáls at fáa fleiri einligar mammur við ungum børnum út á arbeiðsmarknaðin. Við Sky News sigur hann, at ætlanin hjá stjórnini fer at undirgrava bretska samfelagið, sum hann tekur til.

- Stjórnin ætlar at noyða einligar mammur, sum hava børn í skúlaaldri og yngri enn tað, út á arbeiðsmarknaðin, segði Cameron á tíðindafundi í London í gjár.

Hann segði, at ætlanin hjá stjórnini umfatar enntá einligar mammur, sum hava ársgomul børn. Konservativi formaðurin segði, at foreldrini eiga sjálv at avgera, um og nær tey fara aftur á arbeiðsmarknaðin, eftir at tey hava fingið børn.